# - Føroyingar hava góðar sangrøddir

**Tað sigur danski tónasmiðurin Hanne Tofte Jespersen, sum við kórinum Eystanljóð venur tvey tónlistaverk, hon**



Beate L. Samuelsen
beate@dimma.fo

**nýliga hevur skrivað**
Um vikuskiftið hevur daski tónasmiðurin Hanne Tofte Jespersen vant kórið Eystanljóð. Venjingin er liður í eini konsert, sum Eystanljóð skal hava í Gøtu kirkju 20 juni og Vesturkirkjuni 22. juni.

Hanne Tofte Jespersen er umframt tónasmiður eisini songkvinna, pianistur og organistur. Hon, sum er útbúgvin á Universitetinum í Keypmannahavn, er cand. mag. Í tónleiki og filmi og sjónvarpi.



Dansk tónasmiðurin Hanne Tofte Jespersen hevur skrivað tvey tónlistaverk í vetur "Music for Melangell" og "Suite for poems by George Herbert". Um vikuskifti hevur hon vant verkini við kórinum Eystanljóð í Gøtu kirkju
Mynd: Kjartan Madsen

## Virkin tónasmiður

Síðani í fjør hevur Hanne Tofte Jespersen skrivað tvey tónleikaverk fyri kór, solosangarar, orkestur og orgul. Hesi skal Eystankórið framføra saman við fimm mannaða orkestri hennara "Music for the Mysteries", og hevur kórið vant verkini í allan vetur.

Annað verkið verður ein frumframførsla av "Music for Melangell", sum Hanne Tofte Jespersen hevur skrivað í samstarvi við waliska rithøvundan Mike Harris. Hann hevur skrivað søguna um eina keltiska kristna kvinnu, sum var eitt halgimenni.

Danski tónasmiðurin var í Wales í arbeiðsørindum og vitjaði Mike Harris fyri trimum árum síðani. Tónlistaverkið, gjørdi hon liðugt í vetur, og er tað í hesum sambandi, at hon er komin til Gøtu at venja Eystanljóð.

## Umbiðið verk

Hitt tónlistarliga avrikið er eitt verk, Hanne Tofte Jespersen hevur komponerað yvir ymiskar yrkingar hjá enska skaldinum George Herbert, sum livdi tíðarskeiðið 1593 til 1633.

Tað eitur "Suite for poems by George Herbert" og skal framføra aftaná "Music for Melangell" í Gøtu kirkju og Vesturkirkjuni saman við orkestrinum "Music for the Mysteries".

"Suite for poems by George Herbert" er eitt umbiðið verk, sum er skrivað til tríggjar solorøddir, blandað kór, kontrabass og orgul til fimm yrkingar hjá George Herbert.

Eisini hetta verk hevur Hanne Tofte Jespersen nýliga latið úr hondum. Tað skal frumframførast í Ny Vor Frie Kirke í Roskilde síðst í mai, tá eitt spildurnýtt orgul verður tikið í nýtslu.

## Flogøsku-tarn

Hanne Tofte Jespersen skuldi koma til Føroyar fríggjadagin og venja við kórinum sama kvøld, men vegna flogøsku úr Íslandi var eingin flogferðsla, og kom tónasmiourin ikki til Føroyar fyrr enn leygardagin.

Hanne Tofte Jespersen er parts-organistur í Vor Frue Kirke í Roskilde og leiðari av einum barnakóri, sum er knýtt at kirkjuni.

Orsøkin til, at Hanne Toft Jespersen hevur fingið samband við Eystanljóð, kemst av, at hon sum bæði organistur og tónasmiður vitjaði í Føroyum í apríl í fjør.

Kirkjan í Gøtu var sera spennandi og vøkur, og í práti við organistin í kirkjuni nevndi hon, at tað kundi verði áhugavert at fingið lokalar sangarar og kór at framført verkið, sum hon var í ferð við at skriva.

Hon fekk samband við kórið Eystanljóð. Soleiðis kom hetta samstarv í lag. Kórið hevur vant verkini hjá Hanne Tofte Jespersen so skjótt, hon var liðug at skriva tey.

## Trupult við uppmøting

- Eystanljóð hevur ikki ligið á tí løtu síðuni, tá tað kemur til venjingar, sigur Hanne Tofte Jespersen, sum hevur vant við Eystanljóð og nøkrum gestasangarum, síðani hon kom til Gøtu seinnapartin leygardagin.

- Føroyingar hava góðar røddir, og væl liggur fyri at syngja, sigur hon.

- Men tað kann bila eitt sindur við at fáa allar sangararnar av ymsum orsøkum til at møta rættstundis upp. So vit mugu taka atlit fyri tí. Av somu orsøk mugu vit venja, venja og aftur venja, fyri at fáa allar sangarar og allar partar við.

- Tí venja vit aftur í kvøld og týskvøldið, áðenn eg fari heimaftur mikudagin, um ikki flogøskan setir ein stoppara fyri tí, sigur Hanne Tofte Jespersen, tónasmiður.

## Tónleikur í Listaskálanum

Hanne Tofte Jespersen kemur aftur til Føroyar eina viku undan konsertunum í juni og fer tá aftur at venja við Eystanljóð hvønn dag dag, meðan hon er her.

Áðrenn konsertirnar í Gøtu kirkju og Vesturkirkjuni, fer emsemblið hjá Hanne Tofte Jepersen "Music for the Mysteries" at spæla í Listaskálanum í Havn hósdagin 17. og fríggjadagin 18 juni.

At spæla í listaskálum er nakað, sum Hanne Tofte Jespersen hevur lagt seg eftir. Tey vitjandi fáa á henda hátt eina serliga uppliving við tónleiki gjøgnum oyra og listaframsýning gjøgnum eygu samstundis.

Fyri at koma til Føroyar í venjingarørindum og í summar, søkti Hanne Tofte Jespersen um fíggjarligan stuðul úr KulturKontakt Nord-grunninum og fekk hann. Uttan hendan stuðul hevði ikki borið til at komið hendavegin við orkestrinum.